# Fakfelagsfólk eru fáorðað um arbeiðssteðgin



**Hvat halda fakfelagsfólk um arbeiðssteðgin – og hvat halda tey um, at løgtingið møguliga syrgir fyri, at siglingin um Suðuroyarfjørð, Skopunarfjørð og Leirvíksfjørð við lóg verður tikin uppaftur?**

ARBEIÐSSTEÐGUR
*Vilmund Jacobsen*

Sosialurin hevur spurt nøkur fakfelagsfólk, hvat tey halda um arbeiðssteðgin, sum stendst av sáttmálatrætuni millum Starvsmannafelagið og lønardeildina hjá Fíggjarmálaráðnum. Vit hava eisini spurt, hvat tey halda um, at løgtingið í gjár ætlaði at leggja seg út í trætuna og við lóg syrgja fyri, at strandfaraskipini, Smyril, Teistin og Dúgvan, verða undantikin verkfallinum, soleiðis at siglingin um ávikavist Suðuroyarfjørð, Skopunarfjørð og Leirvíksfjørð verður tikin uppaftur.

Fakfelagsfólk eru sum heild fáorðað og hava lítlan hug at gera viðmerkingar til ítøkiligu sáttmálatrætuna, men umboðini fyri arbeiðarafeløgini vísa á, at tey lótu strandfaraskipini sigla við ferðafólki undir seinasta verkfallinum á privata arbeiðsmarknaðinum.

Ása Olsen:

## Landsstýrið kann loysa trætuna

ARBEIÐSSTEÐGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Formaðurin í Heilsuhjálparafelag Føroya, Ása Olsen, heldur, at bólturin í trætuni liggur hjá lønardeildini hjá Fíggjarmálaráðnum.

- Fíggjarmálaráðið vildi ikki góðtaka semingsuppskotið upp á 1%, men tað gjørdi Starvsmannafelagið. Tí hava vit verkbann og ikki verkfall, og tað er heilt hvør sítt, sigur hon.

Ása heldur ikki, at nakar kann liva við eini minni lønarhækking enn henni, sum Starvsmannafelagið góðtók.

- Eg haldi, at landsstýrið situr við útspælinum og kann gera semjuna, sum semingsstovnurin hevur lagt fyri partarnar.

Ása Olsen sigur, at hennara felag er ikki við í hesum stríði, og tí vil hon heldur ikki gera tær stóru viðmerkingarnar til viðurskiftini, men hon sigur seg skilja, at Starvsmannafelagið, soleiðis sum støðan er, ikki hevur viljað givið raktu strandfaraskipunum undantak.

- Eg haldi, at skal løgtingið yvirhøvur leggja seg út í stríðið, er tað semingsuppskotið, sum eigur at verða samtykt - og einki annað, sigur formaðurin í Heilsuhjálparafelag Føroya.

Ingeborg Vinther:

## Vit gjørdu eina 0-loysn í lønarspurninginum

**- Tað er ógvuliga keðiligt hjá okkum at síggja, at tímalønt, sum gjørdu eina nullloysn við arbeiðsgevararnar seinast, nú sita við hús, tí virkini í útjaðaranum tora ikki at keypa fisk, sigur Ingeborg Vinther**

ARBEIÐSSTEÐGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Vit halda, at tíðin er farin frá at leggja útjaðaran lamnan, soleiðis at fólk – og ofta fólk, sum slett ikki eru partur av trætuni - ikki sleppa um firðir og sund, meðan miðstaðarøkið at kalla ikki verður rakt í eini arbeiðsósemju, sigur Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag*

Formaðurin í Føroya Arbeiðarafelag, Ingeborg Vinther, hevur heldur ikki nakran serligan hug at gera viðmerkingar til ítøkiligu sáttmálatrætuna millum Starvsmannafelagið og lønardeildina hjá Fíggjarmálaráðnum.

- Vit valdu við seinastu sáttmálasamráðingar at gera eina null-loysn við arbeiðsgevararnar í lønarspurninginum. Í staðin fingu vit tilsamans 3% upp á eftirløn og trygging.

Hon vísir á, at tá ið arbeiðarafeløgini vístu "samfelagssinni", er tað ógvuliga keðiliga í dag at síggja, at fólk ganga við hús, tí virkini í útjaðaranum ikki tora at keypa fisk.

### Tíðin er farin

- Vit halda, at tíðin er farin frá at leggja útjaðaran lamnan, soleiðis at fólk – og ofta fólk, sum slett ikki eru partur av trætuni - ikki sleppa um firðir og sund, meðan miðstaðarøkið at kalla ikki verður rakt í eini arbeiðsósemju. Vit góvu strandferðsluni undantaksloyvi til ferðafólkaflutning og flutning av vørum sum eru lívsneyðugar, men ikki til vanligan farmaflutning, sigur Ingeborg Vinther.

Formanninum í Føroya Arbeiðarafelag dámar einki, at løgtingið leggur seg út í sáttmálatrætur, tí hetta máar burtur av rættinum at gera sáttmálar millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

Hans Joensen:

## - Vit lótu strandfaraskipini sigla

ARBEIÐSSTEÐGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag, hevur ongan hug at gera viðmerkingar til fyrra spurningin um, hvat hann heldur um arbeiðssteðgin, sum stendst av sáttmálatrætuni millum Starvsmannafelagið og lønardeildina hjá fíggjarmálaráðnum.

- Nei, tað havi eg ongar viðmerkingar til. At siga nakað ella einki at siga um hetta stríð, er eitt val millum pest og kolera, heldur Hans Joensen.

### Skipini sigldu

Hann vísir á, at fakfelagsleiðarum dámar ongantíð, tá ið løgtingið leggur seg út í ósemjur á arbeiðsmarknaðinum, og tí dugir hann heldur ikki at siga, um tað er rætt ella skeivt av løgtinginum við lóg at samtykkja, at niðurlagda siglingin hjá strandfaraskipunum skal takast burtur úr stríðnum.

- Undir seinastu ósemjuni á privata arbeiðsmarknaðinum samdust arbeiðarafeløgini um at lata strandfaraskipini sigla, tí vit mettu tað ikki vera rætt, at útjaðarin verður raktur so hart í mun til miðstaðarøkið.

Hann sigur, at tað vóru limir í arbeiðarafeløgunum, sum loystu og bundu skipini undir verkfallinum.

- At Starvsmannafelagið ikki vil lata skipini sigla, er so teirra val, og tað havi eg sum so ongar viðmerkingar til. Eg kann bara siga, hvat arbeiðarafeløgini gjørdu undir seinastu sáttmálatrætuni, sigur Hans Joensen.

### At lata vápn

Hann vísir á, at tað er altíð keðiligt at lata "vápn" frá sær í einum sáttmálastríði, men formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag heldur framvegis, at arbeiðarafeløgini – við at geva strandfaraskipunum undantaksloyvi at sigla – tóku eina rætta avgerð.

- Eg haldi, at arbeiðarafeløgini vóru ógvuliga solidarisk undir seinasta sáttmálastríði, men hetta er komið lítið fram, nú tey stóru strandfaraskipini hava ligið í stríðnum millum Starvsmannafelagið og lønardeildina hjá Fíggjarmálaráðnum, sigur Hans Joensen.